# Til minnis um Jonhard

Mánamorgunin í næstseinastu viku komu tey bæðu væntaðu og óvæntaðu boðini um at Jonhard Dahl-Jacobsen hevði strítt sítt stríð at enda. Hann gjørdist knappliga 58 ára gamal.

Tað er ein tung uppgáva at skulla skriva um ein persón, sum ein hevur havt slíkt samband við nærum alt lívið. Jonhard var ættaður úr Syðrugøtu, sonur Hans David á Skansa og konuna Fridu, sum var ættað úr Oyndarfirði.

Vit hittust fyrstu ferð á skúlabeinkinum í Gøtu skúla. Lærarinnan, Helga Øregaard, loysti spurningin við hvussu næmingarnir skuldu sita við at lata teir sita saman eftir aldri. Og so javngamlir vóru vit, at vit, føddir í august og september 1943, komu at sita lið um lið og komu at fylgjast øll skúlaárini. Hetta var í teirra tíðini, tá hvør næmingur hevði sítt »hol« í borðininum til blekkglas, har teir í dag hava »teldustikk«! Jonhard var altíð ein fittur drongur og góður kammeratur. Og hann fekk eisini gott ummæli frá sínum lærarum. Eitt stórt upplivilsi vit høvdu fyri nøkrum árum síðani var, tá vit gomlu skúlafelagar kundu hittast í okkara gamla skúla. Tá var Jonhard í essinum og vit fingu rættuliga mint okkum á hesa tíð, sum lá 40 ár afturi í tíðini.



### Byrjaði lívsins skúla.

Vit fóru báðir úr skúlanum 14 ára gamlir, sum tað var vanligt tá. Eg fór sjálvur til skips, men Jonhard fór í læru sum timburmaður. Fyrst í Gøtu hjá Hanus Pállson, og síðani í Havn hjá Hans Hilmar Dam. Gott 20 ára gamal fann hann saman við Maluna, sum var úr Norðagøtu, og harvið gjørdust vit svágrar. Tey giftust í 1966 og fingu nærum 35 ár saman. Tað er sjáldan, at ein hevur sæð slíkar mótsetningar funnið saman sum tey bæði, men tað er eisini sjáldsamt, so væl tað hevur riggað millum tey bæði.

Við giftarmálinum kom Jonhard inn í eina familja, har handalag ikki er fremsti eginleiki. So Jonhard bæði gjørdi og slapp at gera alt sum kravdi hegni at í síni verfamilju. Men seinni fekk hann sínar avloysarar, tá fleiri handverkarar giftust inn í familjuna.

Jonhard vildi ikki »bert« vera timburmaður. So tey bæði fóru niður í nøkur ár, har Jonhard fekk útbúgving sum byggifrøðingur. Tey komu aftur til Føroya í 1967 og Jonhard hevur alla sína tíð arbeitt innan hetta økið. Hann hevur m.a. arbeitt á Telefonverkinum, Lamhauge & Waagstein og Vestmanna kommunu. Umframt hevur hann havt sítt egna virki, har hann m.a. hevur arbeitt fyri fleiri kommunur, heilt úr Vági til Gjáar. Tí standa nógvir »minnisvarðar« eftir hann ymsa staðni í landinum.

### Var eitt lívstykki.

Jonhard var í nógvar mátar ein heilt sjáldsamur persónur. Hann var eitt lívstykki burturav. Hann var altíð í góðum lag, og har hann kom fylti hann alt upp beinanvegin. Hann kundi undirhalda eitt heilt selskap sum t.d. í einum føðingardegi, so fólk lógu skerfløt í látri. Við slíkum evnum er tað ikki so løgið, at hann fekk nógvar vinir og kenningar. Tað vóru tískil heilt nógv sum kendu Jonhard. Hetta kom eisini rættuliga til sjóndar nú á sjúkraleguni, har vinir heilt frá ungdómsdøgunum hava vitjað og stuðlað.

Evnini hjá Jonhard og Maluni at fáa vinir rakk eisini uttanlands við vinasambandi í fleiri londum. Ein av hesum er enski bóndin Roy, sum er kendur av lesarum okkara. Tað vóru foreldrini hjá Jonhard, sum tóku Roy upp ein áarførisdag fyri meira enn 30 árum síðani og bjóðaði honum heim. Jonhard helt sambandið viðlíka, og tí er eisini sorg í Onglandi í hesum døgum.

Jonhard hevði evni á nógvum økjum sum tekning, sang, tónleik og skriving. Kanska kundi hann ikki kallast professionellur á øllum økjunum. Men hann helt seg ikki aftur, og hann nýtti tey evni hann hevði til gleði fyri mong. Og nevnt kann verða, at hann er umboðaður bæði í Songbók Guds Fólk og í nýggju Missiónssangbókini. Hansara áhugamál spreiddu seg eisini vítt. M.a. var hann stigtakari til eitt »høsnafelag«!

### Bakkaði ikki fyri avbjóðingum.

Jonhard bakkaði ikki fyri avbjóðingum. Eitt dømi um hetta er, at sambandið við Roy gjørdi, at alt húskið í 1984 fór til Onglands eitt hálvt ár at búgva og arbeiða, og fingu tey harvið royndir sum er teimum fægstu beskorið og sum tey fegnaðust um til henda dag.

Jonhard hevði teknistovu, tá kreppan tók seg upp í 90-unum. Jonhard gjørdi ikki vandari enn, at hann søkti og fekk starv som kommunuverkfrøðingur í Upernavik, sum er norðasti býur í Grønlandi sunnanfyri Thule. Her gjørdist hann eisini eitt kent andlit, har hann eisini gjørdist vinur við nógv. Annars munnu fleiri minnast Jonhard og Maluna frá teimum sendingum sum bæði útvarp og sjónvarp høvdu úr Upernavik. Tá kreppan hasaðu av, kom hann heimaftur og hevði nú teknistovu og húsasøluna Protek á Vaglinum í Havn.

Tað skal sigast, at tað at fara til Upernavik var meira Jonhard enn Malan. Men hon fór við og Malan syrgdi eisini fyri at fáa nýtt tíðina. Hon arbeiddi á sjúkrahúsinum í Upernavik. Og hetta gav henni íblástur til at fara til Nuuk at taka prógv sum læknaskrivari. Hetta kláraði hon við toppkarakter 50 ára gomul. Neyvan nógv høvdu gjørt henni tað eftir.

Fekk ringast hugsandi boðini.

Fyri einum knøppum ári síðani fekk Jonhard eini boð, sum má vera marran hjá einum og hvørjum: »Krabbamein«. Og boðini vóru enn verri eftir skurðviðgerð í Keypmannahavn: »Einki at gera. Hægst eitt ár eftir.«

Hóast skakaður gav Jonhard ikki skarvin yvir. Hann tók alt fyri eitt stig til at rigga sítt virksemi av fyri at tryggja familjuna. Hetta var eisini gjørt fyri at tryggja, at fyritøka hansara kundi halda fram, hvat ið so hendi.

Sum ein og hvør vildi gjørt, kannaði hann alternativar møguleikar fyri viðgerð. Hetta førdi til viðgerð í Týsklandi. Fyrst tvær ferðir kemoterapi, sum var harður kostur. Men komin heimaftur var Jonhard tann sami. Hann arbeiddi alt sum hann kundi, tí so nógv var at náa. Tað sá veruliga út, sum hann vildi hava slætt borð. Millum tvær av viðgerðunum fór hann til Suðurgrønlands at skipa fyri bygging av trúboðarahúsum, hagar gávur í samband við jarðarferðina nú kunnu latast. Á grøvini var tikið til hvussu nógv ídni hann legði í hesa uppgávu. Men ikki minst hvussu hent tey sambond, sum hann hevði fingið í Upernavik nú royndust í hesum sambandinum.

Jonhard fór triðju ferð til Týsklands 2.páskadag at fáa skurðviðgerð. Men nú gekk ikki so væl. Jonhard kom ongantíð fyri seg aftur. Hvørja ferð hann hevði havt framstig kom eins stórt afturstig. Tað var vónað og trú, at Jonhard skuldi koma fyri seg. Eingin kundi ímynda sær annað við hesum manni, sum var ein slík ímynd av lívi. Men sum frá leið mátti her ásannast, at her var einki at vænta. Hóast hetta var Jonhard tann sami heilt til endan. Tann positivi og skemtingarsami. Eins og hann hevði umsorgan fyri, at tey arbeiði, sum hann hevði undir hond veruliga vórðu avgreidd sum ætlað.

Malan hevur verið stuðulin.

Sum nevnt vóru Jonhard og Malan mótsetningar. Malan er tann friðarliga og umhugsna, sum var trygdin fyri, at jørðforbindilsið altíð var til staðar. Ofta rigga slíkir mótsetningat best saman. Teirra evni at skapa sær vinir hevur eisini merkt, at tað altíð eru nógv fólk, sum eru komin inn á gólvið í heimi teirra, sum var merkt av einum serligum hugna. Malan hevur verið ein heilt avgerandi stuðul hjá Jonhard alt teirra lív saman, og hetta hevur ikki minst verið galdandi hetta seinasta svára árið. Hetta dugdi Jonhard eisini at virðismeta. Og nú kann føldi, at alt kundi henda legði hann børnunum eina við at taka sær av mammuni.

Jonhard og Malan fingu fýra børn: Frida, sum er gift við Stefan Kunoy, Lis, sum er gift við Johan Sørensen, Rói, sum er giftur við Gunn Jacobsen og Jón, sum enn býr heima. Lis býr á Skála, meðan hini børnini búgva í Havn. Abbabørnini eru 4 í tali, og tað var ikki orðið, sum tey vóru góð við abba sín og eisini við ommuna. Tað hava ikki verið nógv børn, sum hava havt ein so stuttligan abba sum tey.

### Tankarnir fara til Hans David.

Í hesi tungu tíð leita tankarnir eisini til Hans David, pápa Jonhard, sum er 89 ára gamal. Hann hevði ta sorg at missa dótrina Jónhild fyri trimum árum síðani, og fyri einum 28 árum síðani doyði Eivind. So Hans David hevur mist 3 av sínum 4 vaksnu børnum. Umframt hetta doyðu tvey børn sum smá. Frida doyði, meðan Jonhard var í Grønlandi. Nú er bert bróðurin Bjarki eftir á lívi. Tað hevur verið ein fragd at kenna Hans David og Fridu, sum hava verið merkisfólk. Tey vóru stak góð við Maluna og tað var týðuligt, at tey vóru stolt av henni, eins og Malan var góð við tey. Tað skal eisini sigast, at samanhaldið í teirri familjuni altíð hevur verið fyrimyndarligt.

Tað verður merkiligt, at eingin Jonhard er longur. Tey eru mong sum fara at sakna hann. Hetta kom eisinni rættuliga til sjóndar hósdagin við teirri stóru fjøld av fólki sum vildu vísa Jonhard tann síðsta heiðurin.

Vit eru øll takksom fyri, at vit hava kent Jonhard.

**Óli**

## Minningarorð
### um okkara elskaða Paula Holmsund, Kambsdal

Syrgilig vóru tey boðini vit fingu tá tú so brádliga varð tikin frá okkum, bert 18 ára gamal.

Tað er so ringt at vita, at tú ikki er ímillum okkum meir, men øll tey góðu minnir, vit hava um teg góði Pauli, tey eru góð at eiga.

Frá fyrsta degi eg sá teg nýføddan, hvat var tú ikki fittur. So fluttu tit norðureftir at búgva. Omman var fleiri ferðir og ferðaðist hjá tykkum, og sum eg eri so glað fyri. So sendi mamma tín teg at ferðast til ommuna ofta, takk góða Leila fyri tað.

Góði Pauli, tað er eitt sár í hjartanum hjá okkum øllum, at tú so brádliga bleiv kallaður heim til Harran. Omman og vit øll lýsa frið um øll tey góðu minnini um teg elskaði.

Farvæl farvæl, men ikki ævugt nei
ein stokkut stund, eitt lítið tíðarskeið
har møtast vit, hvar skilnaður er ei
og inntil tá farvæl.

**Omma tín í Froðba**

## Landsfundur Javnaðarfloksins í Vestmanna 14. og 15. september



